# Ein professari leggur frá sær

*Arne Nørrevang er 67 ára gamal, og hevur lagt frá sær sum rektari á Setrinum. At Arne hevur havt stóran týdning fyri føroyska gransking, var ongin ivi um, tá fráfaringarsamkoma varð hildin fyri honum. Og hann heldur fram at granska privat*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

At siga einum starvsfelaga farvæl er ikki lætt og talurnar, sum vóru hildnar 8. september, tá Arne Nørrevang varð heiðaður fyri drúgvt granskingararbeiði í Føroyum, bera prógv um hetta. Arne hevur havt tilknýti til Setrið síðan miðskeiðis í sjeyti árunum og hann hevur verið lærari, granskari, útnevndur til professara og rektari í hesum tíðarskeiði. Men tá ið tú sigur einum starvsfelaga farvæl og hesin hevur lagt so sjónligar varðar eftir seg, so er tað kanska ikki so galið kortini. Og vanligi føroyingurin hevur nógv at takka Arna Nørrevang fyri. Í nógvum stovum í Føroyum stendur prýðiliga bókin úr føroysku bjargasøguni. Sjálvur datt eg um bókina, einaferð eg var so óheppin at liggja nakrar dagar uttan frælsi á sjúkrahúsi og hendan bókin stendur enn í minninum sum ein av teim frægu. Kanska serliga tí at eg eri í tí støðu at verða uppvaksin í bygd, sum ikki liggur til fuglabjørg og tí var bókin, øll sum hon var, ónomið land fyri meg. Men hon er eisini ógvuliga væl skrivað og skrivað við alski til evnið og Føroyar.

Sum undangongumaður inni í Kalbak á granskingarstovninum har, undir felagsheitinum Biofar, hevur Arne Nørrevang gjørt eitt megnar arbeiði og eftirtíðin fer heilt víst at fegnast um, at lunnar vórðu lagdir undir gransking av smákyktum í føroysku náttúruni niðanfyri sjóvarmálan.

-Nú er so fulla stigið tikið til pensionisttilveruna. Vit vita, at Arne hevur tvørfaklig áhugamál - hugsa um t.d. bókina „Úr Bjargasøguni“ hjá honum, har hann samantvinnar sín áhuga fyri fuglalívinum við ein týðandi part av føroysku mentanini. Tvørfaklig áhugamál eru ivaleyst góð at hava eisini hjá einum Professor Emeritus. Arne liggur ongantíð á lætu síðuni. Nú hevur hann betur stundir til at fáast við annað enn lívfrøði, og so vítt eg veit er hann farin at leita á skjalasøvnum eftir onkrum spennandi, sum eg tó ikki fari at avdúka nakað um her, segði Hans Pauli Joensen, leiðari á náttúruvísindadeildini á Setrinum.

Og nýggi rektarin, Malan Simonsen hevði eisini góð orð at bera Arna Nørrevang, sum hon hevur havt sum starvsfelaga í mong ár.

Arne Nørrevang, professari
Megindeilaráðsformenn
Vísindafólk
Starvsfólk
Studentar
Vinir og kenningar

Tað er við sorgblídni eg bjóði tykkum vælkomin í dag, tí í dag skulu vit siga farvæl. Tað er Arne Nørrevang, professari, sum er farin frá fyri aldur. Men tíbetur fer Arne ikki langa leið burtur, men verður her og kemur ivaleyst á gátt við hvørt í framtíðini.

Skráin er tann, at tá eg havi boðið vælkomin og setta hesa samkomu, fer Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsformaður á Náttúruvísindadeildini at lýsa Arna og starvssemi hansara. Síðani fer Arne sjálvur at siga nøkur orð. UM síðani onkur skuldi havt hug til at skoytt okkurt uppí, eru tey vælkomin at bera fram eina heilsu til Arna.

Sjálv havi eg verið sera hugtikin av rannsóknunum hjá Arna í Fuglalívi og bjargaveiðu. Eins og Arne var eg amatør-ornitologur sum barn. Tá eg gekk í 6. og 7. flokki í Glostrup mitt í 60-unum var ein eldhugaður lærari, sum fór við okkum út í skógin tíðliga um morgunin áðrenn skúlatíð at hyggja at og lurta eftir fugli. Tað var stak áhugavert og fylti tilveru mína heilt nógv tey árini. Um vit ikki vóru flutt, so hevði eg kanska verið fuglafrøðingur í dag. Í bókini eftir Arna Úr bjargasøguni, sum kom út í 1977, hefti eg meg serliga við lýsingina av hvussu lundarnir, sum ikki verpa, flúgva í ringar út fyri berginum, meðan verpingarfuglurin flýgur beinleiðis út frá landi og inn á land í holuna. Tað mest forvitnisliga í hesum helt eg vera, at atburðurin ger fleygamenninar førar fyri bara at taka fugl, sum ikki hevur ungar at føða.

Arne skrivar at hetta og øll føroysk fuglaveiða er ein vistfrøðiligur veiðiháttur, tí endamálið við honum er at varðveita fuglameingið til komandi ættarlið. Nú á døgum kallast slíkt vist »at nýta tilfeingið á burðardyggan hátt«, men líkamikið hvussu tað eitur, fyribrigdi er gamalt og væl roynt, og tað er umráðandi at slíkur kunnleiki verður varðveittur og fær sjónligt pláss í bókmentunum. Við hesi bókini hevur Arne víst hvussu náttúrúvísindi og hugvísindi í grundini eru samantvinnað, náttúrufrøði og hugfrøði eru tvær javnbjóðis síður av lívi okkara.

Tá ið Arne var tilnevndur professari á setrinum í 1995 segði Jóan Pauli Joensen, rektari, at Arne er »ein andsmenningarligur lobbyistur av formati«. Við hesum sipaði hann til, at Arne hevur dugað sera væl at seta nýggjar granskingarverkætlanir á stovn við peningi frá øðrum keldum enn landskassanum. Við atliti at komandi oljuvi9nnuni vónaði Jóan Pauli tá »at fleiri andsmenningarligir lobbyistar av formati fóru at gera vart við seg á røttum stað, so sum minst fer upp í royki og rusti ella hvørvur í havsbrúnni á veg til onnur lond. Tíðin er nú búgvin til, at vit leggja á annan bógv og býta tilfeingið við skili, so vit eisini hugsa um tey, sum koma aftaná okkum«.

Hesum kann eg taka undir við av fullum hugi. Arne hevur verið ein sera góð fyrimynd. Og eg haldi tað glógvar væl í mangastaðn i viðvíkjandi hesum, at fáa aðra fígging enn landskassajáttan til vegar til granskingarverkætlanir.

Arne var undamaður mín í raktarastarvinum. Hann hevur verið beinasamur at heita á í sambandi við rektaraskiftið. Tað og alt, sum tú hevur útint á setrinum og fyrisetrið, fari eg vegna setrið og setursráðið at takka tær hjartaliga og mangar ferðir fyri. Og sum eitt minni um hesa løtu fari eg at handa tær eina gávu, sum er eitt kot »sum tær ungu gentur virka væl« í Gøtu.



*Arne Nørrevang prátar her við Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur*

**Mynd: Jens Kr. Vang**



*Frá samkomuni, tá Arne var heiðraður*

**Mynd: Jens Kr. Vang**



*Hans Pauli Joensen, frá náttúruvísindadeildini takkar Arna fyri gott samstarv*

**Mynd: Jens Kr. Vang**



# Í starvsvenjing umborð á Lómi

*Hesar seinastu vikurnar hevur Dann Thorleifsson verið praktikantur umborð á Lómi*

RÚNI OLSEN

Dann Thorleifsson er 16 ár og gongur í 10.a í Venjingarskúlanum. Hetta er aðru ferð hann er í starvsvenjing. Umborð á Lómi helt Dann var ógvuliga stuttligt. Umborð gjørdi Dann tað sama sum allir, ið arbeiddi har; lossaði, hivaði konteynarar o.a. Arbeiðstíðirnar umborð vóru frá kl. 8 á morgni til kl. 17 seinnapart, og sunnudag var ein frídagur.

Dann var ikki einsamallur praktikantur umborð, ein vinmaður, sum eitur Martin Olsen, var eisini við. Teir vóru eisini ógvuliga hepnir við veðrinum, sól var næstan allar dagarnar, men tað vóru nakrir dagar, har Dann lá í songini við sjóverki.

Dann helt, at hesin túrur var sera væleydnaður, men visti ikki ordiliga um hatta var vegurin, hann ætlaði at fara aftaná 10. flokk.



*Dann Thorleifsson úr 10. flokki á Venjingarskúlanum var í starvsvenjing umborð á Lómi*

**Mynd: Rúni Olsen**

# Leggja seinastu hond á menningarætlan

*Í næstu viku verður Undirvísingar- og Mentamálastýrið væntandi liðugt við eina menningarætlan fyri fólkaskúlan*

Eyðun Klakstein

Í hesum døgum leggur umsitingin í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum seinastu hond á eina menningarætlan fyri fólkaskúlan.

Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt í komandi viku, og tá skal tað so leggjast fyri landsstýrismannin í skúlamálum.

Orsøkin til hetta arbeiðið er fólkaskúlalógin frá 1997, sum leggur upp til, at landsstýrismaðurin ger eina slíka ætlan.

- Ætlanin kemur við einum tilmæli um, hvat fólkaskúlin skal royna at menna næstu trý árini, sigur Hensar Ellingsgaard, leiðari á Fólkaskúladeildini í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

### Skúlarnir hvør sína ætlan

Tað eru serliga nýggju tættirnir í fólkaskúlalógini frá 1997, sum verða viðgjørdir í menningarætlanini. Tað er til dømis flokslæraraarbeiðið, skúlabókasavnini, eftirmetingin og samstarvið



millum lærarar.

Tá menningarætlanin er liðug, og landsstýrismaðurin hevur góðkent hana, skal hon sendast út til skúlarnar, sum síðani skulu gera hvør sína ætlan fyri næstu árini - støðið verður ætlanin hjá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Skúlarnir fáa eina freist at leggja sína egnum menningarætlan til rættis, sum skal innihalda teir lutirnar, sum hvør einstakur skúli ætlar sær at arbeiða við.

# Eingin føroysk umsókn

JÁKUP MØRK

Danski-mentunargrunnurin hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at grunnurin hevur játtað Christinu Siggaard, Hortonomlesandi, úr Keypmannahavn legat til eina námsferð í Føroyum.

Víðari upplýsir grunnurin, at eingin umsókn var innkomin úr Føroyum, um stuðul til námsferð í Danmark.

Komandi ár verður móttakarin av legatinum almannakunngjørdur 3. september, og skulu umsóknir til hetta vera grunninum í hendi innan 1. juni 2001.

# Leivur hevur bara gjørt sína skyldu

*–Vit eru fult greiðir yvir, at spurningurin um at gera SEV til partafelag, verður kannaður, sigur Torfinn Smith, býráðslimur*



*–Verður málið ikki kannað, fer avgerðin at byggja á gitingar og metingar og tað kann ikki vera meiningin, heldur Tórfinn Smith*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað, sum Leivur Hansen hevur gjørt, er ikki annað, enn tað, hann hevur skyldu til at gera.

Torfinn Smith, býráðslimur í Havn heldur lítið um hørðu atfinningarnar frá sambandsflokkinum í Tórshavnar Býráð ímóti býráðsformanninum.

Aðrastaðni í blaðnum átalar sambandsflokkurin harðliga Leiv Hansen, býráðsformann, tí at hann viðgerð spurningin um at gera SEV Til partafelag, saman við hinum býráðsformonnunum í Kommunusamskipan Føroya, sum telur seks tær størstu kommunurnar.

Sambandsflokkurin, sum er í samgongu í Tórshavnar Býráð átalar, at flokkurin onki veit um ætlanina, og at flokkurin onki fekk at vita um hetta, fyrrenn ígjøgnum sjónvarpið.

### Valbruni

Men hetta heldur Torfinn Smith, býráðslimur, lítið um. Hann er býráðslimur fyri javnaðarflokkin, sum eisini er í samgongu í Tórshavnar Býráð.

–Sambandsflokkurin má hava fingið valbruna, heldur hann.

Tórfinn Smith sigur, at spurningurin um at gera SEV til partafelag er ikki ókendur í býráðnum, tí har hevur hann verið umrøddur.

– Tað, sum Leivur Hansen nú hevur gjørt, er ikki annað enn sína skyldu.

Hann sigur, at tað, sum nú liggur í kortinum, er, at fyrimunir og vansar av at gera SEV til partafelag, skulu kannast og tað heldur hann vera sjálvsagt.

–Enn er ongin avgerð tikin. Og ikki fyrrenn fyrimunir og vansar eru kannaðir, hava vit eitt haldgott grundarlag at taka støðu útfrá.

– Verða hesar kanningar ikki gjørdar, skal avgerðin byggja á gitingar og metingar og tað kann ikki vera meiningin, sigur TórfinnSmith.